# Broyta ikki skrivligu próvtøkurnar í ár

**Herfyri mótmæltu studentaskúla og HF næmingar ætlaðum broytingum av skrivligu próvtøkunum. Mótmælini eru nú tikin til eftirtektar**

PRÓVTØKA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*


Sosialurin
Nr. 16 • Fríggjadagur 23. januar 2009 • 83. árg.
300 næmingar mótmæla politiskum dráli
Síða 8-9
Dýrari at sigla við Strandferðsluni

*Tað var tann 23. januar, at 300 miðnámsskúlanæmingar mótmæltu ætlaðu broytingunum við skriftligu próvtøkunum*

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur tikið avgerð um, at próvtøkan hjá studentaskúla- og HF-næmingum komandi summar verður eftir sama leisti sum árini frammanundan.

Tann 23. januar 2009 fekk Mentamálaráðið eitt skriv frá næmingum í 3. s og 2. HF kring landið, har tey vístu á trupulleikar í sambandi við, at skrivligu próvtøkurnar í donskum og enskum vóru broyttar í mun til áður.

Uppgávurnar, sum higartil hava verið nýttar til próvtøkurnar, eru tær somu, sum næmingar á donsku studentaskúlunum hava havt. Danska studentaskúlaskipanin er broytt, og tað eru uppgávurnar eisini, men okkara studentaskúlaskipan er ikki broytt.

Nú “gamla” slagið av próvtøkuuppgávum ikki verður nýtt longur, hevur Mentamálaráðið arbeitt við at menna skrivligar próvtøkuuppgávur í eitt nú enskum eftir einum nýggjum leisti. Bæði næmingar og lærarar á studentaskúlunum og HF-skeiðnum taka undir við teimum ætlaðu broytingunum, men teir hava víst á, at skotbráðið at fara frá gamla uppgávuslagnum til nýggja uppgávuslagið longu á sumri 2009 er ov stutt. Hetta kann verða óheppið fyri næmingarnar, og hava ávirkan á teirra próvtøkuúrslit.

Mentamálaráðið skilir hesi sjónarmiðini, sum bæði lærarar og næmingar hava ført fram um ætlaðu broytingarnar. Eftir at hava viðgjørt spurningin saman við leiðslunum á skúlunum, hevur Mentamálaráðið tikið hesa avgerð, sum merkir, at skrivligu próvtøkurnar hjá studentum og HF’arum í enskum og donskum komandi summar verða eftir tí leisti, sum higartil hevur verið arbeitt við í undirvísingini. Henda avgerð ávirkar ikki virðismetingina av einum føroyskum students- ella HF prógvi.

# Eykajáttan til lívmóðurhálskrabba á tingborð

**Undir orðaskiftinum av munnligum fyrispurningum á tingi í síðstu viku tóktust tingfólk samd um at veita ungum gentum koppseting móti lívmóðurhálskrabba, hóast játtanin er ov lítil. Nú tekur Miðflokkurin tingfólk upp á orðið – og leggur fram uppskot um eykajáttanarlóg**

KRABBAMEIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Endamálið við hesi eykajáttan, er at kunna seta pengar av til at fara undir koppsetan av øllum 12, 13 og 14 ára gomlum gentum. Í verandi játtan er bert peningur tøkur at koppseta tær 12 ára gomlu, sigur Miðflokkurin í fráboðan.

Flokkurin vísir á, at undir orðaskiftinum um munnligan spurning um evnið, tóktist sum breið undirtøka var fyri at bjóða øllum trimum árgangunum at kunna koppseta seg, tó at játtan bert er tøk til ein árgang. Og tískil valdi Miðflokkurin at geva tingmonnunum møguleika at seta handling aftan fyri orðini og játta neyðuga peningin.

Teir tríggir tingmenninir hjá Miðflokkinum siga í viðmerking til uppskotið, at teir fegnast um, at koppseting fyri lívmóðurhálskrabba byrjar, men harmast um at tilmælini frá sakkunnleikanum ikki verða fylgd.

Hesi tilmælini mæla til koppseting av teimum, ið fødd eru í 1994, 1995 og 1996.

- Tíverri hevur Løgtingið bara játtað pening til 1996-árgangin. Uppskot Miðfloksins um eykajáttan fevnir um allar tríggjar árgangirnar og tryggjar hervið bæði tær 12, 13, og 14 ára gomlu verju móti sjúkuelvandi virusinum, siga Jenis av Rana, Bill Justinussen og Karsten Hansen.





**Betri stýring og rykkjan av skuldarum (debitorum)**
*- fáið útistandandi pening í hús*

**Senda tit hópin av rykkjarum?**
Er hetta ein tyngjandi ábyrgd, sum í ringasta føri kann føra við sær, at tit aldrin fáa peningin inn? So er hetta skeiðið helst nakað fyri tykkum.

Á skeiðnum fært tú íblástur til, hvussu tú á bestan hátt handfarir skuldarum líka frá fyrsta faktura verður send, til fyribyrgjan av tapi, til áminngarskriv, ómaksgjøld, rentur og innheintan.

Ofta er tað trupult at vera tann, sum við fremstafingri á lofti skal ringja til kundan fyri at minna hann á at gjalda. Tú fært eisini íblástur til, hvussu tú tryggjar eitt gott og javnbjóðis samskifti við kunda og varðveitir góða sambandi, soleiðis at kundin framvegis ynskir at verða kundi í fyritøkuni.

**Super góðar eftirmetingar**
Luttakarar hava givið hesum skeiðið og skeiðsleiðarunum, heili 10,3 í karakter eftir 13’skalanum.

**Málbólkur**
Størri og smærri fyritøkur, ið ynskja at fáa størri succes við at fáa útistandandi pening í hús.

**Brot úr skránni**
- Tryggja gott samskifti, soleiðis at kundin framvegis ynskir at verða kundi í fyritøkuni
- Loysir tað seg at biðja um ákonto gjald?
- Hvussu menna vit og seta í verk góðar, handilstreytir og kredittpolitik?
- Hvat er at gera, um skuldarin er ógjaldførur?
- Onnur tiltøk um kundin ikki rindar

Synergi - 32BELL (322355)
www.synergi.fo - synergi@synergi.fo
Synergi

**Lær MS Office 2007**
**- lættari, skjótari og betri**

Lær skjótt at gangnýta nýggju brúkaraflatuna hjá Word, Excel, PowerPoint & Outlook - umframt tað nýggja!

*Hava tit dagført tykkara Officepakka til tí nýggjastu versiónina, við øllum teimum nýggju og smørtu funkunum? Upplivir tú oftani frustratiónir, tí alt er ikki sum tað plagar?*

**Spar tíð**
Tú hevur júst fingið Office 2007. Áðrenn tú fekst hetta innstallerað, hevði tú rímuliga væl kekk uppá tey gomlu forritini, eitt nú Word, Excel, PowerPoint og Outlook.

Nú hetta nýggja og smarta Office 2007 loggar á skermin hjá tær, følist tað stundum, sum um tú skalt byrja av nýggjum. Funkurnar eru ikki har tær vóru, og tað er lættari sagt enn gjørt, at finna útav øllum teimum nýggju og smørtu funkunum, sum Office 2007 í veruleikanum hevur at bjóða uppá.

Nú sleppur tú undan at brúka nógva tíð uppá at prøva teg fram. Kom á skeið 27. apríl og lær grundprinsippini.

**Tilmelding**
Tilmelding fer fram á heimasíðu okkara www.synergi.fo - ella ring.
Max. 14 luttakarar.



Synergi

Synergi - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - Tel. 32BELL (322355)